## Ringið til forsetan

Leygardagin 24. mai fáa Føroyar nýggjan ÍSF-forseta. Nýggjur ÍSF-forseti verður antin Annsy Høghamar ella Sølvi Reinert Hansen, sum eru tey bæði valevnini til ÍSF-forsetasessin. Ítróttarfólk, nevndarlimir í ítróttarfeløgum og onnur áhugað fáa nú høvið at stilla spurningar til bæði valevnini. Annsy Høghamar og Sølvi Reinert Hansen verða gestir í Seinnapartssendingini á Rás2 fríggjadagin, eftir tíðindini kl. 15. Tá ber til at ringja inn á tlf.nr. 31 13 31 og stilla viðkomandi spurningar til Annsy og Sølva. So er ikki at lata hetta høvið frá sær.

RÁS ...títt radio

| 1. deild | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
| | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 VB/S | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 18 | 4 | 14 | 15 |
| 2 TB | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 20 | 3 | 17 | 12 |
| 3 07 Vestur | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 24 | 10 | 14 | 12 |
| 4 HB | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 13 | 5 | 8 | 10 |
| 5 AB | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 22 | 8 | 14 | 9 |
| 6 KÍ | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 9 | 18 | -9 | 9 |
| 7 Víkingur | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 6 | 18 | -12 | 7 |
| 8 B68 | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 6 | 12 | -6 | 3 |
| 9 EB/S | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 4 | 26 | -22 | 3 |
| 10 NSÍ | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 7 | 25 | -18 | 0 |

# Vágbingar eru púra ovfarnir



*TB trýsti í longum løtum av dystinum á Sevmýri, men tað var VB/Sumba, sum streyk avstað við stigunum í lokaluppgerðini*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Lokala loysnin tykist bera til betri úrslit, enn teir í VB/Sumba høvdu ímyndað sær, at tað skuldi bera til**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kappingarárið er framvegis ungt. Tað er langt til síðst í oktober, og tað kann væl vera, at tað í næstbestu fótbóltsdeildini fer at venda eitt sindur øðrvísi, tá ið 27 umfør fara at vera spæld.

Higartil hevur kappingin verið eitt sindur óruddulig. Orsaka av illveðri bíðar eitt umfør, sum verður spælt nú leygardagin, og orsaka av altjóða dystum seinni í summar hava onkur feløg spælt fleiri og onnur færri dystir í 1. Deild.

### Fegnir vágbingar

Men tað er einki at ivast í, at tað er VB/Sumba, sum hevur fingið mest sannførandi byrjanina. Eftir fleiri ár við nøgvum útlendskum spælarum flutti liðið í fjør niður. Teir í sunnaru helvt í Suðuroy góvu til kennar, at teir ógvuliga fegnir vildu vera við til at manna eitt felags suðuroyarlið. Tað vóru fleiri í norðaru helvt, sum eisini vóru fyri hesum, men málið fall á aðalfundi í TB, og so verður spælt í tveimum liðum úr Suðuroy í næstbestu deildini.

Ábendingarnar úr Vági hava verið greiðar um, at teir ikki ætlaðu at spenna bogan høgt. Gamli miðvallarin Jón Pauli Olsen er venjari, og gamli málmansverjanurin, Bjarni Johansen, sum nú er formaður í felagnum, og sum legði handskarnar á hillina í fyrraárið, er aftur millum stólparnar.

Higartil hevur gingið upp á stás hjá VB/Sumba, og eftir 2-0 sigurin á Sevmýri í góðveðrinum í gjárkvøldið, tók onkur vágbingar til – í skemti – at nú tykist sum um, at liðið hjá teimum fer at koma í uppflytingarvanda!

Undir øllum umstøðum er VB/Sumba oddalið við fullum stigatali. Grannauppgerðin á Sevmýri var væl vitjað, og tað var intenst og spennandi, hóast TB longu eftir hálvan tíma misti málverjan, Ivan Stojkovic, eftir at hann sum aftasti maður hevði felt Dan Djurhuus. Pól Thorsteinsson umsetti úr ellivu metrum ímóti Olivuri Abrahamsen, sum var farin í TB málið.

Hóast TB var undirmannað, so góvust heimamenninir ikki. Fleiri vandamiklar hornasparksstøður stóðust í 2. hálvleiki, men Bjarni Johansen, Pól Thorsteinsson og hinir í VB/Sumba veruni hildu tætt, og í yvirtíðini skoraði Kenneth Kjærbo til 2-0, og harvið er VB/Sumba sannførandi oddalið, meðan TB eftir tvey tap á rað datt niður á triðja pláss.

### Vestur móti uppflyting

07 Vestur flutti við trivaligum 8-1 sigri á teimum næstbestu hjá Víkingi upp á uppflytingarpláss, og við 4-2 heimasigri á NSÍ nærkast AB nú teimum, sum kappast um tvey tey ovastu plássini og harvið uppflytingina. Leygardagin fer AB at taka ímóti TB, meðan VB/Sumba skal í Gundadal at spæla ímóti HB.

Við trivaligum 3-0 sigri á Toftum mikukvøldið styrkti HB um sína støðu í kappingini um heiðursmerkjaplássini. Tá ið HB liðið er væl mannað – og tað er tað oftast í Gundadali – er møguleiki fyri góðum úrslitum ímóti øllum hinum.

KÍ tapti stórt í tveimum teimum fyrstu umførunum í Sørvági og í Vági. Síðani hevur KÍ vunnið tríggjar ferðir. Hesa ferð var tað í Streymnesi, har Leon Bjartalíð aftur taldist millum málskjúttarnar. KÍ sigurin var 3-2, og fýra mál vórðu skorað í sambandi við deyðbóltsstøður. Hjá heimaliðnum skoraði Dánjal Davidsen bæði málini. Mánakvøldið var hann fyrstu ferð millum teir fyrstu ellivu á besta liðnum. Hjá KÍ skoraði unglingaspælarin Eli Simonsen, sum hevur vunnið sær pláss á besta KÍ liðnum, tvær ferðir.

EB/Streymur, B68 og NSÍ stríðast fyribils í botninum, meðan Víkingur framvegis er leysur frá teimum niðastu. Leygardagin verður Víkingur partur av fyri vánirnar at sleppa undan botninum týdningarmiklari uppgerð í Klaksvík.

| Máltindurin | | |
|---|---|---|
| 1. deild | | |
| Johan Eivind R. Mouritsen | TB | 8 |
| Tróndur Sigurðsson | AB | 7 |
| Tór-Ingar Akselsen | 07 Vestur | 5 |
| Allan Mørkøre | AB | 5 |
| Leon Bjartalíð | KÍ | 5 |
| Olivur Abrahamsen | TB | 5 |
| Jens Erik Rasmussen | 07 Vestur | 4 |
| Kim Poulsen | 07 Vestur | 4 |
| Birgir Jørgensen | VB/S | 4 |
| Finnur Justinussen | Víkingur | 4 |

## FAKTA um dystin

**AB-NSÍ 4-2 (4-1)**
1-0: Dion Splidt 13.
2-0: Tróndur Sigurðsson 22.
2-1: Øssur Dalbúð 24.
3-1: Dion Splidt 38.
4-1: Tróndur Sigurðsson 44.
4-2: Øssur Dalbúð 71

**TB-VB/Sumba 0-2 (0-1)**
0-1: Pól Thorsteinsson br 32.
0-2: Kenneth Kjærbo 90.
Reytt kort: Ivan Stojkovic, TB, 31.

**07 Vestur-Víkingur 8-1 (2-0)**
1-0: Andrzej Stretowicz 27.
2-0: Gunnar Haraldsen stút 40.
3-0: Sjúrður Ellefsen 47.
4-0: Tór Ingar Akselsen 50.
4-1: Bárður Hansen 55.
5-1: Andrzej Stretovic 60.
6-1: Tór Ingar Akselsen 63.
7-1: Kim Poulsen 76.
8-1: Kim Poulsen 87.

**B68-HB 0-3 (0-2)**
0-1: Tummas Hans Rubeksen 36.
0-2: Pætur Jørgensen 40.
0-3: Páll M. Joensen 87.

**EB/Streymur-KÍ 2-3 (1-1)**
1-0: Dánjal Davidsen 42.
1-1: Leon Bjartalíð 45.
2-1: Dánjal Davidsen 48.
2-2: Eli Simonsen 58.
2-3: Eli Simonsen 76.

**Leygardagin 10. Mai**
AB-TB
HB-VB/Sumba
KÍ-Víkingur
B68-07 Vestur
EB/Streymur-NSÍ